


# TJALDRIÐ OG BRIMIL IKKI RÁÐ TIL OLJU

**EFTIRLIT** – Vit sigla einki óneyðugt, men hava altíð annað skipið tøkt, um bráfeingis boð eru. Sjálvandi er tað ein trupulleiki fyri eftirlitið á havleiðunum, tá fíggjarligt rásarúm ikki er til rakstur og soleiðis eisini til olju, sigur Jóhan Simonsen, fulltrúi, á Fiskiveiðieftirlitinum

Vilmund Jacobsen

Føroyar eru ein fiskivinnutjóð meiri enn nøkur onnur tjóð, sum vit kenna, men vit hava eftir øllum at døma ikki ráð til eitt veruligt eftirlit við havøkjunum kring Føroyar. Nú árið er farið at halla, sansar at hjá Fiskiveiðieftirlitinum við pengi til rakstur, og hetta gongur útyvir siglingina hjá vaktar-og hjálparskipunum, Tjaldrinum og Brimli.

Tað váttar Jóhan Simonsen, fulltrúi á Fiskiveiðieftirlitinum.

Hann sigur, at síðan miðskeiðis í oktober hava Tjaldrið og Brimil siglt lítið, tí peningur er simpulthen ikki til at sigla oljuna burtur.

– Skipini hava í løtuni støð á Skála, har ymiskar umvælingar eisini verða gjørdar. Men royna at skipa so fyri, at annað skipið altíð er tøkt, um so er, at bráðfeingis boð eru eftir okkum til hjálparuppgávur.

### Vantandi eftirlit

Jóhan Simonsen ásannar, at vantandi peningur til rakstur gongur útyvir eftirlitsuppgávurnar, sum skipini hava.

– Eftirlit er ikki bráðfeingis uppgávur, og tí verður tað hesin parturin,

---

# Línuskip mist fiskiloyvi í 14 dagar

**BROT** - Fráboðanarskyldan hevur sum heild virkað væl við partrolarunum, tá talan hevur verið um smáan upsa, men tað vísir seg, at útróðrarbátar og línuskip ikki hava verið líka skjót at boða frá, tá nøgdin av ungfiski gerst ov stór, sigur Fiskiveiðieftirlitið

Vilmund Jacobsen

Seinastu tíðina hevur Fiskiveiðieftirlitið verið runt landið og hevur kannað eftir veiði av ungfiski. Hesar kanningar hava fyribils ført við sær, at eitt størri línuskip hevur mist fiskiloyvi í 14 dagar. Eftirlitsfólkini hjá Fiskiveiðieftirlitinum staðfestu nevniliga, at heili 43% av toskinum í lastini var ungfiskur, sum er fiskur minni enn 50 cm.

At eitt skip soleiðis missir fiskiloyvi í 14 dagar, merkir, at skipið slett ikki sleppur til fiskiskap í hesum tíðarskeiði – heldur ikki til Íslands, um kvota er eftir har yviri.

Á Fiskiveiðieftirlitinum vil Jóhan Simonsen, fulltrúi, kortini ikki siga, hvat línuskip talan er um, tí skipið hevur ein kærumøguleika.

Fulltrúin vísir á, at áður hava onkrir útróðrarbátar mist fiskiloyvi fyri at hava havt ov nógvan ungfisk, men honum kunnugt er hetta fyrstu ferð, at eitt størri línuskip hevur mist fiskiloyvi av hesi orsøk.

Jóhan Simonsen sigur, at tað serliga er í ár, nú nógvur smátoskur er at fáa, at trupulleikar hava verið við íblanding av smáfiski.

– Ynskiligt hevði verið, at vit høvdu havt gjørt enn fleiri kanningar, men hesar fara at halda fram, leggur hann aftrat.

Fulltrúin sigur, at tað serliga er húkaveiðan, sum hevur verið ein trupulleiki í hesum árinum.

– Tað er nógvur smáfiskur at fáa, og um skip og bátar ikki ansa eftir, hvar teir seta sínar línur, kann prosentparturin av smáfiski skjótt gerast ov stórur.

Jóhan Simonsen sigur, at heilt síðan 1993 hevur verið galdandi, at boðast skal frá, um ov nógvur ungfiskur er uppi í veiðini.

– Henda fráboðanarskylda hevur sum heild virkað væl